# EB/Streymur hevur undanvind

*2. deild: Men venjarin, Bergur Magnussen, hugsar í fyrstu atløgu ikki um at flyta upp í bestu deildina*

LÍF–EB/Streymur 2–3 (1–2)

– Nei, nei. Vit hugsa yvirhøvur ikki um at flyta upp í 1. deild. Vit taka ein dyst í senn, og um vit fara at megna eina endastøðu, sum verður omanfyri miðjuna, so verða vit væl nøgdir. Megna vit tað, so verður talan um stóra framgongd, um vit sammeta við undanfarin ár.

Hetta staðfestir Bergur Magnussen. Gamli skarprættarin í B36, í Streymi og í samansetta liðnum, EB/Streymi, hevur í ár ábyrgdina av liðnum hjá teimum í Sundalagnum í næstbestu deildini, og úrslitini higartil hava verið so mikið góð, at eftir fýra umfør er EB/Streymur í toppinum.

Tá vit spyrja venjaran, hvat tað er, sum hevur gjørt, at liðið, sum undanfarnu árini hevur stríðst fyri at sleppa undan niðurflyting úr 2. deild, nú telist millum oddaliðini, so hevur hann ikki nakra avgjørda áskoðan á tað:

– Vit hava fingið Jón Sigurð Gleðisheygg í miðverjuna, og hann er ein góður stuðul. Annars hava vit umleið sama fólkið, sum vit hava havt undanfarin ár. Vit venja tríggjar ferðir um vikuna, og kanska eru spælararnir eitt sindur hugaligari í ár, enn teir hava verið undanfarnu árini. Tað møta 14–18 upp hvørja ferð, og teir eru hampuliga væl fyri, sigur Bergur Magnussen, sum var væl nøgdur við fótbóltsspælið hjá sínum monnum í 1. hálvleiki móti LÍF.

Leygardagin fór EB/Streymur úr Leirvík við øllum stigunum. Tá fyrra umfarið var hálvrunnið, vóru teir frammanfyri 2–0. Fyrra málið stútaði Jón Sigurd Gleðisheygg, eftir at horna varð sent innfyri úr høgru.

Seinna málið skoraði Halldórur Joensen. Eisini í tí førinum var talan um innlegg. Eftiransingarnar vóru vánaligar, og miðvallarin fekk høvi at temja í brotsteiginum, áðrenn hann skoraði.

Stutt undan hvíldini minkaði heimaliðið um munin. Kristian í Vági stútaði frísparksinnlegg í málið, og stórar partar av seinna umfarinum var trýstið frá LÍF stórt. Tað eydnaðist teimum at javna, og tað líka sum lá í luftini, at um eitt mál fór at koma afturat, so fóru tað at verða heimamenninir, ið fingu tað.

Petur Sjúrðarberg stútaði til 2–2, eftir at innlegg var komið úr høgru.

Og so endurtók gamla søgan seg. Í øllum LÍF trýstinum hevði EB/Streymur onkur mótálop, teir fingu eitt sindur betur tak, tá stóra LÍF trýstið ikki hevði givið meiri úrtøku, og eftir uppspæl í høgru og innlegg frá Vinjardi Dam eydnaðist tað Dániali Magnussen at skora sigursmálið.

Snópisligt hjá LÍF og kærkomið hjá EB/Streymi.

– Okkum restar ein stýrimann, sum er førur fyri at broyta leikferðina. At vit vóru so grammir í 1. hálvleiki hevði við sær, at orkan gekk undan í 2. hálvleiki, og tá komu vit undir stórt trýst, staðfestir Bergur Magnussen. Komandi leygardag fara hann og hinir í EB/Streymi at taka ímóti KÍ, sum triðja leygardagin upp í slag fer at royna at fáa eitt stig burturúr málleysum javnleiki á útivølli.

Hjá LÍF hevur tað ikki hilnast væl higartil, og leygardagin verður tað aftur torført. Tá skulu teir spæla á Sevmýri.

jh

**LÍF–EB/Streymur 2–3 (1–2)**

0–1: Jón Sigurd Gleðisheygg 14.
0–2: Halldórur Joensen 23.
1–2: Kristian í Vági 39.
2–2: Petur Sjúrðarberg 71.
2–3: Dánial Magnussen 88.



*Ungi Kristian á Lakjuni spældi ein góðan dyst í miðverjuni, men hann gjørdist annar av syndabukkunum, tá ein vinnari skuldi finnast í brotssparkskapping*

*Mynd: JH*

# Kreppa í Klaksvík

*Løgmanssteypið: Vágamenn, sum fríggjadagin duttu niður á aftasta sessin í bestu deildini, skelkaðu Klaksvíkina, tá tað eftir umdyst og sektasparkskapping eydnaðist at basa KÍ*

Jákup Mørk

KÍ-FS Vágar 2-2 (0-1) FS Vágar vann 9-7 eftir umdyst og brotsspørk

Higartil í ár hevur ikki gingist júst eftir vild hjá fótbóltshugaðu klaksvíkingum. Liðið, sum í fjør tók sær av gullmerkjunum í bæði lands- og steypakapping hevur als ikki fingið glið á spælið í ár, og hetta speglast eisini aftur í stigatalvuni, har KÍ bert hevur fingið fimm stig í fimm dystum.

Í steypakappingini hevur tó gingist nakað betri, og uttan iva vóru vónirnar hjá áskðarunum knýttar at løgmanssteypinum, har KÍ vann sín bólk, og fekk eitt á pappírinum yvirkomiligt mótstøðulið. Nevnliga niðasta liðið í fremstu deildini, FS Vágar.

### Løgdu nógv fyri

Tað gekk tó ikki long tíð, áðrenn vágamenn høvdu boðað frá, at heimaliðið á ongan hátt skuldi vænta sær nakran lættan sigur og harvið atgongd til hálvfinalurnar í steypakappingini. Longu í fyrsta álopinum var um reppi, at bólturin lá í meskunum aftan fyri nýggja málverjan, men eftir nakað av trunkaspæli í brotsteiginum, fekk Zoltan Kujundzic at enda fatur á bóltinum.

Skjóta ávaringin fekk tó ikki teir á heimaliðnum at rakna við, og fyrstu 20 minuttirnar av dystinum, vóru tað ístaðin gestirnir, sum stóðu fyri mesta bóltspælinum.

Fleiri málmøguleikar spurdust eisini burtur úr trýstinum, men tá vágamenn løgdu seg á odda, var tað eftir somu uppskrift, sum hevur verið nýtt, hvørja ferð teir hava skorað í landskappingini, deyðbóltar. Horna varð skoti inn móti KÍ málinum, og bólturin var somiki nær, at hann tók í samankomingina, áðrenn hann støkk út aftur. Har stóð Hannus Olsen púra leysur, og hann langaði bóltin í málið, uttan møguleika hjá málverjanum.

Vágaliðið royndi framhaldandi at trýsta skelkaðu KÍ leikararnar, men tá hálvleikurin var á leið hálvrunnin, var tað eins og heimaliðið fekk betri fatur á.

Seinastu 20 minuttirnir gekk sostatt rættuliga javnt á, har bæði liðini stríddust fyri at fáa takið á miðvøllinum, uttan at nakrir stórvegis málmøguleikar spurdust burturúr.

### Javnaðu í evstu løtu

Ein av stóru trupulleikunum hjá KÍ hevur higartil verið, at liðið hóast nógv spæl hevur havt sera ilt við at skapa sær nakrar upplagdar málmøguleikar, og harumframt er Kurt Mørkøre ikki longur á liðnum, til at fáa fatur á leysum bóltum, sum hann síðani fekk umskapt til mál.

Hetta var so at siga eisini gongdin sunnudagin, og tá klaksvíkingar tíðliga í seinna hálvleiki javnaðu, var tað eisini við góðari hjálp frá gestunum.

Úr vinstru sendi Røogvi Jacobsen ein høgan bólt oman móti málinum. Sum so var eingin vandi á ferð, men tá Rógvi sendi innfyri, var Darius óheppin, soleiðis at Remi í málinum varð fullkomuliga snýttur.

Hetta var sum vátur vøttur at fáa hjá gestunum, og næstu løtuna var tað brádliga KÍ, sum hevði greiða yvirvág í spæli. Vágaliðið royndi tó at muta ímóti, og miðskeiðis í hálvleikinum fingu teir fríspark burtur úr eini álopsroynd, og so var aftur vandi á ferð. Bólturin varð sendir inn fyri, og eftir eitt sindur av aftur og fram, gjørdist Tór-Ingar brádliga leysur, og hann ivaðist ikki, tá møguleikin beyðst.

KÍ leikararnir royndu eftir hetta at trýsta seg oman móti mótstøðumálinum, men júst sum tað at kalla sá vónleyst út hjá teimum, bragdaði knappliga. Rógvi Jacobsen sendi eina góða sending inn um vágaverjuna, har Hjalgrím Elttør dróg nøkur fet, áðrenn hann úr høgru smekkaði til har og flatt inn um handara stólpa.

### Jan varð syndabukkur

Málið gav aftur nakað av andarúmi til klaksvíkingar, men hóast teir soleiðis fingu 30 eyka minuttir á vøllinum, so eydnaðist ikki at avgera dystin, og so máttu brotsspørk til.

Fyrstu royndina hjá gestunum misnýtti Ari Thomassen, og síðani skiftust liðini bæði um at skora. Fjórða brotssparkið hjá heimaliðnum varð tó misnýtt av Kristiani á Lakjuni, sum annars hevði staðið seg væl í miðverjuni, og so stóð aftur á jøvnum.

Liðini skiftust so at skjóta, til annar parturin misnýtti, og hesin lutur fall á Jan Joensen, sum sostatt gjørdist stóri syndabukkurin í Klaksvík.

Syndabukkur er kanska í so nógv sagt, men einki er at taka seg aftur í, at brotssparkskappingin er ein eirindaleysur háttur at avgera dystir uppá. Sum ein ávísur danskur álopsleikari segði fyri góðum 15 árum síðani, so er onkur noyddur at misnýta, tí leikararnir kunnu ikki skjóta brotsspørk alla náttina á tamb.

Niðurtúrurin hjá KÍ, sum annars sá út til at vera steðgaður dýra biðjudag, tykist sostatt vera fullkomin. Í løtuni eru teir tíggju stig aftan fyri oddaliðið í landskappingini, og brotsspørkini viðførdu, at teir nú hava sagt farvæl til steypið við horninum fyribils.

Vágaliðið vístu tó aftur, at teir avgjørt ikki skulu metast sum nakar dumpikandidatur, hóast verandi støðuna í botninum. Verður hugburðurin í landskappingardystunum hin sami, sum varð sýndur í Klaksvík sunnudagin, er einki at ivast í, at stigini skjótt kunnu setast inn á bók.

**KÍ-FS Vágar 2-2 (0-1)**
8-9 eftir brotsspørk

0-1: Hannus Olsen
1-1: Sjálvmál
1-2: Tór Ingar Akselsen
2-2: Hjalgrím Elttør

Dómari: Birgir Sondum

**KÍ:**
Zoltan Kujundzic - Niclas Niclassen, Jan Andreasen, Kristian á Lakjuni - Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Marek Wierzbicki, Heðin á Lakjuni, John Ryan - Srecko Milisivic, Rógvi Jacobsen

**FS Vágar:**
Remigius Mykoliunis - Emil Hentze, Zylvanuis Zudis, Darius Magdasauskas, Rimvydas Bakus - Sonni Johansen, Albert Ari Thomassen, Hannus Olsen, Tór-Ingar Akselsen - John Johansen, Birgir Joensen



# Sannur steypagysari í Gundadali

*Løgmanssteypið: Báðir Bárðarnir hjá HB gjørdust hetjunar í Gundadali. Bárður Johannesen tók tvey brotsspørk, meðan Bárður Mortansson setti seinasta seymin í B63 kistuna*



*Frøin var sjálvsagt ovurstór, tá Rúni Nolsøe við einum dreymaskotið sendi bóltin í málið til 2-1, men í 95. minuttir eydnaðist kortini B36 at toga seg uppaftur á javnleik*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Jákup Mørk

B36-HB 2-2 (1-0)
HB vann 6-3 eftir umdyst og brotsspørk

B36 hevur seinni árini havt meira enn trupult við at basa grannunum úr HB, tá liðini bæði hava hitst. Somikið illa hevur gingist í hond í grannuppgerðunum, at tað als ikki er uttan orsøk, at áskoðarar hjá báðum feløgum tosa um HB-kompleksið hjá B36.

Tí var tað kanska ikki dreymurin hjá leikarum og viðhaldsfólkunum, sum gekk út, tá tað gjrødist greitt, at grannarnir skuldu hittast í fjórðingsfinaluni í steypakappingini.

Lagið á viðhaldsfólkunum hjá árstalsfelagnum mundi heldur ikki gerast betri av, at B36 noyddist at vera fleiri stuðulsleikarar fyri uttan, í týdningarmikla dystinum.

Jens Kristian Hansen og Bjarni Prior hava báðir drigist við skaðar, og harumframt mátti Jákup á Borg sita uttanfyri, orsakað av reyða kortinum, sum hann ognaði sær á Sandi dýra biðjudag.

### Bjarni varð klárur

Tað eydnaðist tó Bjarna at manna seg upp, so hann fekk verið við í dystinum, men kortini var B36 liðið nakað umskipað, í mun til undanfarnu dystirnar. Mikkjal Thomassen varð fluttur niðan á miðjuna, meðan Fróði Clementsen og Herbert í Lon Jacobsen røktu verjusessirnar framman fyri Egil Zachariassen.

HB liðið var tó eisini nakað skert undan dystinum. Gigi, sum hevur verið bæði skaddur og sjúkur, var enn ikki komin rættuliga fyri seg, og tískil varð Símun fluttur longur inn á miðvøllin, meðan Pætur Dahl enn einaferð røkti miðvallarsessin í vinstra borði.

Janus Joensen, fekk ein rættuligan stoyt fríggjadagin, men hann var kortini til reiðar sunnudagin, so alt í alt líktist HB liðið at kalla sær sjálvum.

Ein av veikleikunum hjá HB hevur í undanfarnu dystunum verið, at liðið ikki í nóg stóran mun megnar at bróta ígjøgnum í síðunum, har Símun Eliasen og Ingi Rasmussen fyri tað mesta hava roynt seg. Hetta hevur tó ikki eydnast serliga væl, tí hvørgin teirra hevur tær dygdir, sum verða kravdar á hesum plássum. Ikki tí, báðir eru teir sterkir leikarar, sum eisini hava verið á landsliðnum, men styrki teirra er mitt á vøllinum, og ikki úti í borðinum.

Sunnudagin hevði HB-venjarin roynt at loyst henda trupulleika soleiðis at álopsskyldurnar í høgru vórðu loystar av Jóhannis Joensen, meðan Ingi flutti seg longur inn á vøllin, tá HB liðið var í álopið.

### B36 átti alt

Tað var tó rættuliga sjáldan, at Jóhannis fekk víst sínar framrættaðu dygdir fyrsta partin av dystinum, tí B36 liðið átti satt at siga alt spælið í fyrra hálvleiki.

Serliga var tað Jan Guttesen, sum skaraði framúr á miðvøllinum, har hann helst vann fleiri bóltar enn alt HB liðið tilsamans, og ferð eftir ferð slapp hann sær skilagott av við bóltin, so nýtt álop kundi setast í gongd.

Bæði Magni á Lakjuni og Carl Herup Høgnesen vóru framrættaðir í síðunum, og tað hendi seg ofta, at vandamiklar støður spurdust burtur úr hesum.Um hálvan hálvleikin var um reppið, at B36 legði seg á odda, eftir at teir enn einaferð komu framvið í vinstru síðu, men Bjarni rakk akkurát ikki bóltinum frá Magna, og Håkan tóktist ikki nóg avgjørdur, tá bóltur fall fyri føtur hansara.

Løtu seinni vóru aftur boð eftir HB-málverjanum. Jan Guttesen vann bóltin á miðjuni, og spældi síðani Bjarna púra leysan. Hevði Bjarni hugt upp, hevði hann kanska sæð, at hann og Jan vóru tveir einiir við málverjanum, men ístaðin fyri at rulla upp á tvørs, royndi hann at lobba bóltin, men Bárður fekk kortini fatur á.

Stutt eftr hetta fekk B36 hornaspark, og so kundi enn einaferð staðfestast, at HB verjan hevur alstórar trupulleikar av deyðbóltsstøðum. Bjarni Prior er helst ein av sterkastu leikarunum hjá B36, tá tosað verður um spælið við høvdinum, men kortini slapp hann at standa púra leysur, tá Magni sendi hornasparkið inn, og hetta lat hann sær ikki bjóða tvær ferðir.

Hóast leiðslumálið, so helt B36 fram við ágangandi spælinum, og við eitt sindur av hepni, kundu teir eisini økt um leiðsluna.

Í hinum endanum av vøllinum hendi millum lítið og einki. Onkuntíð var um reppið, at HB fekk onkran hissini møguleika, men hvørja ferð eydnaðist kortini B36 leikara at fáa fatur á bóltinum.

Vandamesta royndin var helst, tá Bárður Mortansson varð leiktur leysur, men linjuverjin mundi helst vera einasti maður í Gundadali, sum helt kvika áleyparan vera rangstaddan, tá bólturin varð sleptur inn um verjuna.

### Nýttu aðrar dygdir

Í seinna hálvleiki var HB liðið so at siga hamskift. Ingi Rasmussen og Símun Eliasen vórðu skiftir út við Hall Danielsen og Róa Árting, og hetta viðførdi alt fyri eitt, at HB spælið gjørdist nógv betri skipað.

Báðir eru teir leikarar, sum royna at lata bóltin gera arbeiðið, og nú varð tað brádliga HB, sum hevði bóltin nógv meira.

Einar tíggju minuttir eftir, at hann var komin á vøllin, eydnaðist tað Róa at krúlla seg ígjøgnum B36 verjuna, men tá bólturin varð rullaður tvørt fyri málið, var B36 verjan kvikari á bóltinum.

Tað lá tó líka sum í luftini, at tað skuldi eydnast HB at javna, og tá 20 minuttir vóru eftir leika, eydnaðist hetta eisini. Rúni Nolsøe kundi kanska valt at latið seg detta, tó hann dróg fram við verjuleikara í høgra borði. Hann helt sær tó á fótum, og sendi eitt flatt skot úr spískum vinkli. Tróndur fekk vart fyri í fyrstu atløgu, men Hallur Danielsen var fyrstu á returinum, og so stóð á jøvnum.

Stutt eftir var um reppið, at sviin hjá B36 slapp leysur, men Bárður var skjótur úr málinum, so hann kundi rudda burtur.

Yvirvágin, sum HB hevði havt í seinna hálvleiki, hvarv so at siga eftir útjavningina, og seinasta løtan av vanligu leiktíðini var helst hin besta í dystinum, um hugsað verður um fótbóltsspælið.

Hvørgin parturin hevði hug at geva seg, og við skjótum spæli, skolaðu álopini báðar vegir. Ferðin var høg, Nógvir og harðir nærdystir vóru á miðvøllinum og fleiri góðar tekniskar detaljur vóru at síggja. Ja snøgt sagt sýndu liðini hesa løtuna nakað av tí besta, sum føroyskur fótbóltur hevur at bjóða.

### Í himmiríki og aftur

Tað lá kanska í luftini, at farast skuldi út í longda leiktíð, og soleiðis gjørdist eisini, men áðrenn tað kom so langt, sluppu viðhaldsfólkini hjá báðum feløgum bæði at gráta og flenna.

Tá klokkan við tennisvøllin var farin um teir 89. minuttirnar, átta HB hornaspark. Bólturin var í fyrstu atløgu sendir útfrá, men við einum dreymaskotið sendi føðingardagsbarnið og liðskiparin, Rúni Nolsøe, bóltin heilt upp í samankomingina, haðani hann legði seg í síðunetið hinumegin.

Frøin á leikarum og viðhaldsfólkum var sjálvsagt ovurstór, men B36 leikararnir høvdu enn ikki givið skarvin yvir. Einir seks minuttir vórðu lagdir afturat tíðini, og hesa løtuna legði B36 stórt trýst á HB málið. Vónin um javnleik mundi tó hvørva, tá Magni úr stuttari fjarstøðu sendi bóltin framvið HB málinum, men lítla løtu seinni kundu B36 leikararnir hálsfevnast.

Enn einaferð var atvoldin til málið ein deyðbóltsstøða. Úr vinstru sendi Magni hornaspark innfyri, og eftir at Egil fyrst hevði roynt seg við skotið, kundi Ronnie Samuelsen við seinasta sparkinum í dystinum seta bóltin í málið.

### Meira dramatikkur

Var vanliga leiktíðin undirhaldandi, so varð longda leiktíðin tað ikki minni. Eftir stuttari løtu hevði Carl risastóran møguleika, eftir at Ronnie í fyrstu atløgu stútaði á tvørstongina, men ístaðin fyri at skjóta fyrstu ferð, royndi Carl at temja bóltin, og so fekk verjuleikari beint bóltin burtur.

Dramatikkurin fekk enn eitt skump uppeftir, tá Hans á Lag átti seinasta sparkið í fyrra umfarinum av longdu leiktíðini. Sparkið var tó rættað móti Jan Guttesen, og tá dómarin stóð beint hjá, var bara ein vegur, og tað var út.

Stutt undan hesum varð verjufelagin hjá Hans, Florin, skaddur, tá hann royndi seg við frísparki, og eftir at hann var settur niðan í álopið at standa, varð HB verjan fullkomuliga umskipað seinasta korterið.

Orkan var tó farin at ganga undan hjá B36, og hóast yvirvtalið í leikarum, megnaðu teir ikki at leggja nakað skipað trýst á HB liðið, og eftir 120 undirhaldandi minuttir var greitt, at dysturin skuldi avgerast við sektasparkskapping.

### Bárðarnir avgjørdu

Her gjørdist Bárður Johannesen í HB málinum stóra hetjan. Hann tók sær nevnliga av báðum teimum fyrstu skotunum frá ávíkavist Magna og Fróða, meðan Ronnie Samuelsen sum einasti B36 leikari hevði sett bóltin í netið. Tá so Rúni, Rói og Andrew allir skoraðu upp á sínar møguleikar, var tað upp til ein annan Bárð, Mortansson, at avgera dystin.

Hann sveik ikki álitið, og so kundu HB áskoðararnir tysja inn á vøllin at takka sínum leikarum.

Meðan reyð/svørtu grannarnir sostatt kundu fegnast um enn ein sigur í lokaluppgerðini, sótu B36 leikararnir á miðvøllinum og gramdu seg.

Sjálvsagt er tað ein keðiligur lutur at skula lúta í eini brotssparkskapping, men koritni skal sigast, at leikararnir hjá hvíta høvuðsstaðarfelagnum als onga orsøk høvdu til at stara niður í vøllin. Tað skulu tvey góð lið til fyri at skapa ein góðan fótbóltsdyst, og hetta megnaðu HB og B36 til fulnar. Dysturin hevði so at siga alt tað, sum vanliga verður sett í samband við ein rættan steypadyst. Nógvar nærdystir, høga leikferð, gott spæl í løtum og fram um alt spenning og dramatikk. Snøgt sagt hevði hvørki av liðunum uppiborið at tapa, men dysturin skuldi so avgerast, og her varð tað so HB, sum dróg longra stráðið. Kanska orsakað av einari sálarligari yvirvág, sum stavar frá stoltum steypatraditiónum og siðvenjuni við at vinna á grannunum.

**B36-HB 2-2 (1-0)**
3-6 eftir brotssparkskapping

1-0: Bjarni Prior
1-1: Hallur Danielsen 70.
1-2: Rúni Nolsøe 90.
2-2: Ronnie Samuelsen 90.

Dómari: Niklas á Líðarenda

**B36:**
Tróndur Vatnhamar - Fróði Clementsen, Egil Zachariassen, Herbert í Lon Jacobsen - Carl Herup Høgnesen, Mikkjal Thomassen, Jan Guttesen, Magni á Lakjuni - Bjarni Prior, Håkan Lundholm, Ronnie Samuelsen

**HB:**
Bárður Johannesen - Jóhannis Joensen, Florin Miháescu, Hans á Lag, Janus Joensen - Ingi Rasmussen, Rúni Nolsøe, Símun Eliasen, Pætur Dahl - Bárður Mortansson, Andrew av Fløtum